# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Aftur á slóðina:

## Túrur fyri útróðrarmenn til Grønlands

TÍÐINDASKRIV

Um nóg nógv tekna seg, verður skipað fyri einu túri til Grønlands í seinnu helvt av august fyri teir sum róðu út við bátum á Hvarvinum frá síðst í 50-unum til seinna partin av 60-unum. Tað eru teir báðir Magnus Fuglø og Jógvan Weihe í Havn, sum báðir vóru við í hesi vinnu, sum skipa fyri túrinum.

Eftirætlan verður farið við flogfari úr Keypmannahavn mánadagin 21. august. Flogið verður beinleiðis til Narssarsuak, og síðan við tyrlu til Nanortalik. Ætlanin er so at sigla til ymisk pláss sum t.d., í Frederiksdal, Aappilattoq og á veðurstøðina í Prins Christian Sund. Vitjað verður eisini í teimum havnum, har skipini lógu.

Endamálið við túrinum er at vitja aftur á teimum støðum, har útróðurin gekk fyri seg. Hetta verður so avgjørt ein áhugaverdur túrur og ein stór uppliving hjá teimum sum vóru við í hesum arbeiði, siga Magnus Fuglø og Jógvan Weihe, sum í mong ár hava havt eitt ynski um at koma einaferð aftur yvir til Grønlands. Fleiri hundrað mans vóru við í hesum arbeiði.

Skip, sum vóru við í hesi vinnu í Grønlandi, vóru t.d. skonnartirnar Tinganes, Kongshavn, Hvítabjørn, Atlantsfarið, Mars og Marité.

Ferðalagið verður aftur í Keypmannahavn mánadagin 28. august. Farið verður úr Føroyum nakað áðrenn fráferðina úr Keypmannahavn.

Áhugaði kunnu venda sær til Magnus Fuglø á tel. 214637 ella hjá Jógvan Weihe á tel. 553897.




## Kári og Kári við »Rit & Rák«




*Kári Árting og Kári Justinussen í nýggja handlinum »Rit & Rák« í SMS*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Hósdagin 15. juni læt nýggjur bóka- og pappírshandil upp í SMS, talan er um handilin Rit & Rák, sum teir báðir Kári Justinussen og Kári Árting eiga í felag**

HANDIL

Í sambandi við stóru um- og útbyggingina í SMS hevur nýggi bóka- og pappírshandilin »Rit & Rák« sæð dagsins ljós. Handilin er ein samanrenning av Grifflinum hjá Kára Justinussen og Bókasøluni hjá Kára Árting í SMS.

»Rit & Rák« er ein stórur handil upp á 320 fermetrar og er harvið helvtina størri enn Grifflinum og Bókasølan vóru tilsamans.

Handilin er bygdur upp eftir sama konsepti sum donsku handlarnir í Bog & Ide-ketuni. Eisini er ætlanin at geva út 5-6 katalog um árið sum verða send í hvørt hús.

Eigararnir av »Rit & Rák« siga, at nýggi handilin gevur teimum størri og betri møguleikar, vøruúrvalið er størri, arbeiðsgongdin verður meira effektiv, og nú fæst alt á einum stað.

**Dagurin í morgin**

**21. juni. Longsti dagur.** Sólstøður, tá ið sólin stendur hægst á luftini um miðdagin. Kann vera 21. ella 22. juni. Dagurin eitur eisini Albanus. Hann var úr Onglandi, og gjørdist biskupur í Mainz, har hann varð hálshøgdur, tá ið vandalar um ár 400 søktu at býnum.

Faroe Dive, Klaksvík:

## Snorkling út fyri Syðrugøtu



Hósdagin 14. juni skipaði Faroe Dive fyri einum nýggjum og spennandi tiltaki fyri føroyingum og vitjandi gestum okkara.

Talan var um snorkling út fyri Syðrugøtu. Tey, ið hava vitja Miðjarahavið og Reyðahavið o.a., kenna óiva til snorkling, har fólk svimja í vatnskorpuni við fitjum, masku og snorkli. Afturat hesari útgerðini hevði Faroe Dive, útvegað luttakarunum turrdraktir soleiðis at tey kundu verða heitt og turr á túrinum í Syðrugøtu.

Endamálið við snorkling er, at eygleiða og uppliva framúrskarðandi vakra heimin, ið er í sjónum. Fram við oyggjum okkara er, eins og aðrastaðir, ótrúliga nógv vakurt at síggja bæði av djórum og landsløgum. Á hesum túrinum útfyri Syðrugøtu sóðu luttakararinir m.a. stóran og vakran taraskóg, ternumurtar og reyðfisk. Tey ið skipaðu fyri tiltakinum, vóru á einum máli um at hetta verður eitt afturvendandi tiltak í summar.

Sosialurin
www.sosialurin.fo